# Sjúkrarøktarfrøðiskúli partur av føroyskum universiteti

**Mentamálaráðið fer í næstum fer at enduskoða lóggávuna fyri Fróðskaparsetrið og Læraraskúlan. Í hesum sambandi verður kannað, hvussu Fróðskaparsetrið, Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin á ein ella annan hátt kunnu samskipast í framtíðini sum partar av tilboðnum á einum føroyskum universiteti: Lærdi Háskúli Føroya. Hetta upplýsti landsstýriskvinnan í útbúgvingar- og mentamálum, Annita á Fríðriksmørk á pallborðsfundi í vikuskiftinum.**

RÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Annita á Fríðriksmørk umrøddi í sínum innleggi á pallborðs-fundinum á ráðstevnuni hjá sjúkrarøktarfrøðingum serstakliga allan útbúgvingarspurningin, sum hon helt vera ein týðandi part av tí vegamóti, sum varð umrøtt á ráðstevnuni. Tað var í 1999, at Undirvísingar- og Mentanarstýrið tók við ábyrdini av sjúkrasystraútbúgvingini. Málsøkið "Skúlamál" varð yvirtikið í juli 2002 og føroyska lógin um sjúkrarøktarfrøðiútbúgving varð sett í gildi í februar í ár. Í lógini er ásett, at sjúkrarøktarfrøðingaútbúgvingin tekur fýra ár, og at føroysku sjúkrarøktarfrøðingarnir skulu fáa bachelor heitið.

Annita á Fríðriksmørk segði, at Mentamálaráðið í næstum fer at endurskoða lóggávuna fyri tveir aðrar lærustovnar, nevniliga Fróðskaparsetrið og Læraraskúlan. Í hesum sambandi verður kannað, hvussu Fróðskaparsetrið, Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin á ein ella annan hátt kunnu samskipast í framtíðini.

Landsstýriskvinnan vísti á, at tann mynd, sum vit síggja fyri okkum, er, at útbúgvingin av sjúkrarøktarfrøðingum í framtíðini verður partur av tilboðnum á einum føroyskum universiteti: Lærdi Háskúli Føroya. Á Lærda Háskúlanum verða allar tær útbúgvingar, ið leiða til Bachelor, Master ella kandidat og Ph.d savnaðar.

- Í hesum høpi er sera umráðandi, at vit ikki gloyma tað, sum er aðalendamálið við útbúgvingini, t.e. at útbúgva sjúkrarøktarfrøðingar við bæði praktiskum og teoretiskum førleikum. Hava vit støðugt hetta endamál fyri eyga, er eftir míni meting eingin vandi fyri, at sjálv røktin og røktarfrøðin fara at detta niður ímillum, hóast tann ástøðiliga ella akademiska síðan kemur at fylla nógv í framtíðini.

Hon vísti so eisini á týðandi leiklutin sum bæði Familju- og heilsumálaráðið og Almannaráðið hava fyri partar av útbúgvingini av sjúkrarøktarfrøðingum. Somuleiðis hevur sjúkrarøktarfrøðiskúlin gjørt eitt megnar arbeiði.

Landsstýriskvinnan vónaði, at nýggja útbúgvingin verður til gagns fyri øll. Hon takkaði felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fyri gott og álitisfult samstarv. Felagið var við í arbeiðinum við nýggju lógini og er tað ikki minst felagnum fyri at takka, at úrslitið gjørdist so gott, sum tað gjørdist. – Vit fingu eina góða lóg.

# Menning setir krøv til nýggjan hugburð í heilsuverki

**– Arbeiðsbólkur er settur at lýsa viðurskiftini í sjúkrahús- og heilsuverkinum sum heild at gera eina strategiætlan fyri, hvussu samstarv og annað kann skipast í framtíðini, soleiðis at vit fá so nógv sum møguligt fyri játtaða peningin og at vit gagnnýta høli, útgerð og annað optimalt segði Bill Justinussen, landsstýrismaður á pallborðsfundi í vikuskiftinum**

RÁÐSTEVNA
*Jan Müller*



*Millum pallborðsluttakararnar vóru trý landsstýrisfólk*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Ikki færri enn trý landsstýrisfólk vóru við til pallborðsfund, sum felagið hjá føroyskum sjúkrarøktarfrøðingum skipaði fyri í Norðurlandahúsinum leygardagin. Teir vóru Annita á Fríðriksmørk, landsstýriskvinna í mentamálum, Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum og Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum.

Bill Justinuussen vísti í sínum innleggi á, at tað hevur eydnast at fáa eina útbúgvingarskipan á heilsuøkinum, sum eisini er eitt vegamót. Viðvíkjandi sjúkrarøktarsfrøðingum eru vit í øllum førum enn í tí hepnu støðu, at vit klára so nøkunlunda at fyljga við tá talan er um loypandi at útbúgva fólk til hesi størv. Enn eru við í øllum førum betur stillað á hesum øki enn nógv av grannalondum okkara men tøknilig menning og øktir viðgerðarmøguleikar føra til øktan tørv á sjúkrarøktarfrøðingum, læknum og heilsustarvsfólkum.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum gjørdi vart við, at útbúgvingar-politikkurin má tó ikki bert miðja ímóti at útbúgva nýggj fólk, men eisini veita eftir- og víðari útbúgvingarmøguleikar. Nógv okkara hava tað soleiðis, at vit ræðast nýmótans tøkni í ávísan mun og oftani kann tað tykjast møtimikið at skula læra um slíka tøkni. Givið er tó, at eins og á øllum øðrum økjum, so er eisini neyðugt fyri sjúkrarøktarfakið at fylgja við gongdini og at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum nýggja tøknin setir. Hóast hesa gongd, so eiga vit kortini ongantíð at gloyma, at tað skulu vera vit, sum stýra tøknini og ikki umvent, og tøknin kann heldur ikki gera alt. Tann umsorgan og tann menniskjaligi leikluturin, sum altíð hevur verið ein partur av sjúkrarøtkini kemur ongantíð at hvørva.



*Fullsett var í Norðurlandahúsinum leygardagin*

*Mynd: Jonhard Hammer*

## Psykiatriøkið

Bill Justinussen sannaði á fundinum, at psykiatriøkið er eitt av økjunum innan heilsuverkið, sum í stóran mun er forsømt. Karmarnir, sum sjúklingar hava fingið í boði á hesum øki hava langt frá verið nøktandi. Sjúklingarnir og teirra viðurskifti eiga sjálvandi at verða miðdepilin á einum hvørjum øki innan heilsuverkið. Men hann sannaði eisini, at eins og fyri øll onnur arbeiðspláss, so er sjávlandi eisini fyri neyðini at skapa trivnað á hesum slagnum av arbeiðsplássum. Hann segði seg væl skilja, at tær umstøður, sum verða bodnar á psykiatriska økinum sum arbeiðpláss ikki eru serliga lokkandi fyri starvsfólk og sannaði, at tað hevur verið trupult at varðveita nóg mikið av tí kvalifiseraðu arbeiðsmegini á økinum. Hann helt tað tí vera gleðiligt, at vit á hesum øki eru komin til eitt annað vegmót. Hann vísti víðari á, at tað fyri nøkrum árum síðani var gjørt eitt álit um framtíðar psykiatri, sum tað umsíðir er eydnast at fáa sett pening av til men ásannaði, at henda játtan loysir ikki allar trupulleikar frá einum degi til annan men hon er ein byrjan, sum letur upp fyri nøkrum møguleikum, sum vit hava biðið m.a. starvsfólk á økinum um at koma við hugskotum til. Tá talan er um sjálva økispsykiatriina er tankin, at sjúkrarøktarfrøðingarnir fáa ein avgerandi leiklut.

## Landssjúkrahúsið

Landsstýrismaðurin nevndi eisini nýggja bygnaðin á Landssjúkrahúsinum, sum hann metti vera eitt stórt stig, ið verður til gagn og gleði fyri bæði sjúklingar og starvsfólk. –Sjálvur trúgvi eg, at hetta fer at vísa seg at vera eitt sera týðandi vegamót fyri Landssjúkrahúsið. Ikki bert tað at fáa ein nýggjan bygning, men eg vóni og vænti eisini, at ringvirkningarnir av hesum eisini fara at vísa seg við uppaftur betri trivnaði á Landssjúkrahúsinum sum arbeiðspláss. Hann kundi staðfesta ein sera góðan trivnað og samanhald á t.d. Suðuroyar sjúkrahusi eftir at tað var nútímansgjørt og útbygt, og kendi hann seg sannførdan um, at hetta eisini var orsakað av at arbeiðsumstøðurnar eru góðar.

## Samstarv

Bill Justinussen nam eisini við samstarvið millum tey trý sjúkrahúsini og segði, at uttan mun til um vit vilja tað ella ikki, so er ávirkanin uttanífrá so sanniliga við til at mynda ta leið, sum heilsuverkið stýrir eftir inn í framtíðina. Landsstýrismaðurin vísti á, at tað var hansara politiski aðalsetningur at royna at víðka um samstarvið millum tey trý sjúkrahúsini. Tey høvdu í farnari tíð sínar høvuðsuppgávur í nærumhvørvinum og vóru við til at veita tryggleika fyri tey ymsu økini í landinum. – Men við árunum er nógv hent á bæði samferðsluøkinum, á samskiftisøkinum, á heilsutøkniliga økinum, sum ger, at møguleikarnir hjá sjúkrahúsunum at veita heilsutænastur røkk longur enn bert til nærumhvørvið.

Um fá ár verða munandi batar framdir innan samferðsluna til bæði Suðuroynna og Norðoyggjar, tá nýggja suðuroyarferjan kemur í sigling, og tá fast samband verður um Leirvíksfjørð. Harumframt eru samferðslumøguleikarnir til útlond eisini nógv mentir seinnu árini. Flogið verður til bæði Noregs, Onglands, Íslands og Danmark.

Landsstýrismaðurin metti tað vera avgerandi neyðugt, at tað støðugt verður arbeitt við at tillaga føroyska sjúkrahúsverkið og heilsuverkið annars, fyri framhaldandi at kunna tryggja føroyingum nøktandi heilsutænastur á so nógvum økjum sum møguligt. Talan er bæði um tillaging av viðurskiftum innanhýsis á teimum trimum sjúkrahúsunum, millum sjúkrahúsini, millum sjúkrahúsini og primera heilsusektorin, og millum sjúkrahúsverkið og viðgerðarstøð uttanlands.

Landsstýrismaðurin upplýsti, at hesar sannroyndir eru eisini orsøk til, at settur er ein arbeiðsbólkur at lýsa viðurskiftini og gera eina strategiætlan fyri hvussu samstarv og annað kann skipast í framtíðini, soleiðis at vit fá so nógv sum møguligt fyri játtaða peningin og at vit gagnnýta høli, útgerð og annað optimalt. Tí tað vil í longdini verða til frama fyri bæði sjúklingar og starvsfólk.

Ikki ein spurningur um trúgv ella kall:

# Men at vera professionellur tænastuveitari

**– Í mínum hugaheimi kemur faklig dygd og dokumentað ástøði fram um fakbólk og fakfelag. At veita sjúkrarøkt er ikki ein spurningur um trúgv, ella eitt kall, men ein spurningur um at vera professionellur tænastuveitari, sum fær fult uppiborna løn fyri sítt arbeiði, uttan mun til um tað er á granskingarstigi ella í gerandisrøkt segði Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður á pallborðsfundi leygardagin.**

RÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

- Hvat er ein sjúkrarøktarfrøðingur, hvar er sjúkrarøkt, og hvussu prógva tit, at tit duga tað, sum tit eru, og vilja vera vóru spurningar, sum landsstýrismaðurin í almanna-málum, Páll á Reynatúgvu, setti á pallborðsfundi við fullsettum Norðurlandahúsi av sjúkrarøktarfrøðingum. Og hann helt fram, at svarini helst eru líka nógv, sum tað eru persónar í Norðurlandahúsinum henda dag. Men próvbyrðan er tykkara líka frá leiðslum til lesandi legði landsstýrismaðurin aftrat.

Hansara boð var annars, at tað gongur ikki long tíð, til vit hava fyrsta føroyska professaran í sjúkrarøkt, og so ger tað einki, um hon ella hann, eisini rúmar tí kjarnusjúkrarøkt, sum brendi seg í minni hansara ein morgun á Landssjúkrahúsinum fyri 15 árum síðani. Við hesum sipaði landsstýrismaðurin til tann morgunin hann vaknaði upp á sjúkrahúsinum eftir at hava fingið tikið mandlurnar og har bert sá og møtti fittum, fyrikomandi og smílandi sjúkrasystrum.

Páll á Reynatúgvu helt fyri, at hesi somu 15 árini hevur felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar ment seg til at vera eitt av sterkastu og mest virdu fakfeløgum í landinum og stendur sum ein viti fyri hini feløgini á heilsuliga landkortinum, ið flestu enn goyma seg í skjúrtufaldinum á donskum mostrafeløgum.

- Men tíðin stendur tíbetur ikki í stað. Viljin og vitanin fara altíð at leita sær fram á leið. Tráanin eftir at gera tað góða betur og at finna nýggjar leiðir er náttúrlig, og júst hesi viðurskifti gera, at sjúkrarøktin í dag stendur á einum vegamóti segði landsstýrismaðurin og vísti, at tað tá er týdningarmikið at gera upp, hvar ein er staddur, hvar ein ætlar at fara, og um tað ber til at fara har ein ætlar sær.

Hann vísti á, at tað kann vera stórur munur á leiðini hjá fagfelagnum, og hjá fakligu serfrøðingunum, ella ressourcupersónunum í felagnum. Fakfelagspolitiska leiðin kann snúgva seg um at vinna land, at fevna víðari, fáa fatur á valdinum og leiðslufunktión-unum, meðan tað ikki er óhugsandi at fakligu serfrøðingarnir velja fakligu granskingina, innovatiónina og dokumentatiónina sum rætta vegin fram.

## Heilsuhúsið fyllist

Páll á Reynatúgvu metti sjálvur, at veruleikin helst er, at hóast avbjóðingarnar eru nógvar, so byrjar at fyllast í føroyska, og eisini altjóða, almanna- og heilsuhúsinum. Og møguleikarnir at flyta mørk, fyri ikki at siga flyta um mørk, fækkast. Albogarnir spískast, og fakmørkini verða kritað upp.

- Á ovastu hædd ráða læknarnir, og hóast trol á vøruni, so verja teir manniliga borg. Í síðurúmunum búgva terapeutarnir, og sálarfrøð-ingarnir. Og undir væðingini socialráðgevararnir, pedagogarnir og lærararnir. Í kjallaranum byrja heilsurøktararnir og sálarheilsurøktararnir at gera vart við seg. So hóast sjúkrarøktarfelagið ehvur eina sentrala søtðu, og virkið á miðhæddini, so kann tað tykjast sum tað at sleppa út og vinna land er ein møtimikil fakfelagslig uppgáva. Og tá havi eg ikki sagt eitt orð um øll tey alternativu tilboðini.

Landsstýrismaðurin segði víðari, at venda vit øllum á høvdið og siga, at samstarvið um og nøgdsemi hjá brúkarunum, viðskiftafólkinum, sjúklingunum er málið, so koma fakligu serfrøðingarnir til sín rætt, og hava møguleika at menna fakið og viðhvørt, røkka inn um mark, hjá fakligu grannunum, sum liður í samlaðu brúkaratænastuni.

- Í mínum hugaheimi kemur faklig dygd og dokumentað ástøði fram um fakbólk og fakfelag. At veita sjúkrarøkt er ikki ein spurningur um trúgva, ella eitt kall, men ein spurningur um at vera professionellur tænastuveitari, sum fær fult uppiborna løn fyri sítt arbeiði, uttan mun til um tað er á granskingarstigi ella í gerandisrøkt.